TILTØK

Gudstænastur
1. Sunnudag eftir páskir
Havnar kirkja: kl. 11 Sonja Klein. Talvan gongur fyri KFUK í Havn
Vesturkirkjan: kl. 11, Bergur D. Joensen
Kirkju- og missiónshúsið á Argjum: kl. 11 Gudstænasta
Kollafjørður: kl. 11, Marjun Bæk
Sandavágur: kl. 11, David Johannesen
Gjógv: kl. 11 Konfirmatión, Emil Olsen
Hattarvík: kl. 11,
Kirkja: kl. 12.15, Elsa Funding
Haldarsvík: kl. 12, Mogens Tilsted Christensen
Selatrað: kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
Rituvík: kl. 16, Familjugudstænasta, Meinhard Bjartalíð
Gøta: kl. 11 konfirmatión, Martin R. Jacobsen
Christianskirkjan: kl. 11, Sverri Steinhólm
Mikladalur: kl. 12, John Myllhamar
Sandur: kl. 12, Bjarni Bæk
Tvøroyrar kirkja: kl. 11, Familju- og barnagudstænasta, Jónsvein Bech
Porkeris kirkja: Sunnudagin gongur talvan fyri neyðhjálp kirkjunnar.

Broytt kirkjutíð: Komandi sunnudag verður farið í kirkju kl. 11.00 í Fuglafirði og á Hellunum.

Frá komandi sunnudegi verður aftur farið í kirkju kl. 11.00 í Gøtu.

Broytt kirkjutíð: Komandi sunnudag 3. apríl verður farið í kirkju kl. 11 í Sandavági, Miðvági, Sørvági og Bø.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 14 Junior, kl. 19 Sangløta v/ Jógvan Olsen, Toftir o.fl.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudag kl. 11 Møti, sunnudagsskúli kl. 14, Bøn kl. 17.30, Møti kl. 18.
Mánadag kl. 17 og 19 Skótamøtir.
www.frelsunarherurin.fo

Sjómanskvinnuringurin á Argjum
kemur saman mánakvøldið kl. 20.00. Allar kvinnur hjartaliga vælkomnar.

Samkoman við Marknagil
Skúlaheimið, Marknagilsv. 75
Sunnumorgun kl. 10.30 Møti, breyðbróting. Barnaansing verður eisini.
Mánakvøld kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti, kl. 21.30 Bibliugransking. Dánielsbók.

Meinigheitshúsið
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta fyri kvinnur.
Sunnudagsskúli, kl. 18 Meinigheitsfundur, Gratia og Meinigheitskórið syngja.

Evangeliihúsið, Tróndargøta
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18 evangel. møti. Hjúnini Lene og Andreas Jørgensen tala á báðum møtunum.
Mánakvøldið kl. 20 felags bønarmøti í Oasuni í Hoyvík.
www.gospel.fo

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Lars Messerschmidth, prestur, í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.
www.katolsk.fo

Missiónshúsið v/ Landavegin
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni, kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/ Jústines Poulsen.

Fríkirkjan Oasan
Uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jóhan P. Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.
Verið øll hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

Frá Ebenezer
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Jóan Hendrik Winther Poulsen.
Evnið: Føroysk fólkanøvn.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 9.30 Leiðaraskeið v/ Scott Wilson, kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Scott Wilson, kl. 11.50 Barnagudstænasta, kl. 18 Møti. Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

Saron, Vestmanna
Á evangeliska møtinum sunnukvøldið kl. 18 talar Scott Wilson, nátturði verður aftaná.
Mánakvøldið verður ungdómsmøti.

Vestmanna missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Regin Høgnesen og kl. 21 Ungdómsfundur.

Miðvágs missiónshús
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti og meinigheitsfundur, Jan Johannesen talar og lovsongsbólkurin syngur, barnaansing, aftaná verður drekka.

Missiónshúsið í Miðvági
Sjómanskvinnuringarnir í Vágum koma saman í Missiónshúsinum mikukvøldið kl. 19.30. Thorleif Johannesen verður við. Mint verður á pakkarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Filadelfia, Miðvágur
Sunnudagurin kl. 11 Familjudagsskúla.
Mikukvøldið kl. 20 undirvísing og bøn.

Missiónshúsið í Sørvági
Sunnudagin verður møti/-meinigheitsfundur kl. 18. Elisabeth H. Joensen talar, drekka, barnaansing.
Sunnudagsskúlatíðin er broytt til kl. 13.30.

Aglow, Vágur
Leygarkvøldið 2. apríl kl. 20 møti fyri allar kvinnur í Missiónshúsinum Libanon í Sørvági.

Samkoman Lívsins Orð
Saltangará
Sunnudagin er møti kl. 17.00 v/ Símun Jacobsen.
Mánadagin kl. 20 Ungdómshúsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús v/ Dánjal Petersen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Oddvør og Hans Jacobsen.
Barnamøti kl. 17.
www.keldan.fo

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 hugnalig samvera saman við Sjómanskvinnuringinum og Torleif Jóhannesen, trb. Pakkafest, kaffi og køkur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Elim í Søldarfirði
Sunnudagin kl. 12 Sunnudagsskúli og minnismáltíð Harrans. Sunnukvøldið kl. 18 luttaka Susan og Øssur Berghamar.

Thabor, Fuglafjørður
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Ongin sunnudagsskúli verður sunnudagin, men familjumøti verður kl. 18, har barnakórið syngur.

Sjómanskvinnuringurin í Runavík
kl. 19.30 til hugnaløtu í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.

Missiónshúsið í Leirvík
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl 18 Møti v/ Tórhild Bjarkhamar, kl. 21 Ungdómsmøti við bíbliubólkinum hjá teimum eldru. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Á møtinum sunnukvøldið kl. 18 talar Thomas J. Askham. Simoni Knudsen syngur.

Betesda, Klaksvík
Sunnukvøldið kl. 18 skipar sangkórið fyri evangeliska møtinum.

KFUM & K, Klaksvík
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Familjumøti, kl. 21 Ungdómsmøti.
Mánakvøldið kl. 20 møtir Sjómanskvinnuringurin. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.kuff.fo

Getsemane, Klaksvík
Leygarmorgun kl. 10 Bøn.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið á Viðareiði
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið 2. apríl kl. 21 v/ Jóannes Fonsdal.

Kirkjan í Mikladali
Fríggja- og leygarkvøldið kl. 20 verður møti v/ John S. Myllhamar, trúboðara.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti.
Innsavnan.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Vegna barnaguðstænastu verður eingin sunnudagsskúli sunnudagin. Kl. 18 Møti.
Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Vitnið, Hvalba
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.

Aglow, Suðuroy
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 í húsinum hjá Frelsunarherinum í Vági, har Gordon Grieve talar. Menn og kvinnur eru vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygardagin kl. 20 hevur Aglow møti í Frelsunarherinum í Vági – fyri allar kvinnur og menn.
Sunnudagin kl. 11 Familjudagur, kl. 18 Evangel. møti, Eingrím Holm talar. Øll eru vælkomin.

Føroyahúsið
Fríggjakvøldið 8. apríl kl. 20.30 hevur Kristnastova møti í Føroyahúsinum. Jógvan Jacobsen talar. Eisini er á skránni: sangur, vitnisburður og góður felagssangur. Ókeypis te/kaffi og køkur. Ver vælkomin.
NB: Hetta kvøldið er einki fríggjakvøldsmøti í Kristnastovu á Birmavej 36, Amager.

Kristnastova
Fríggjakv. 8. apríl er fríggjakvøldsmøti ikki í Kristnastovu, men í staðin er tað í Føroyahúsinum kl. 20.30.

Århus
Føroyskt møti verður í hølinum hjá Frelsens Hær, Klostergade 54 í Århus, sunnudagin 3. apríl kl. 17. Vit syngja við. Fríur vitnisburður og solosangur. Ímillum luttakararnar verða: Olvheðin Jacobsen, Anfinn Eliasen, Fríðbjørg og Karl Meinhard Michaelsen. Klaver og solosangur: Linda Petersen og Astrid Viðbjørg. Aftaná verður kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Ørkin, Reykjavík
Leygarkv. 2. apríl kl. 20.30 Hugnakvøld v/ Sólbjørg Símunarson.
Sunnukv. kl. 20.30 Møti v/ Sólbjørg Símunarson. Aftaná verður kaffi.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Innsavnan av barnamyndum o.ø. til ólavsøkuframsýningina.
Mánadagur 4. apríl:
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobb og onnur spøl.
Tilmelding til skeiðið í perlubinding mikudagin frá kl. 10-16. Tlf. 316491
Týsdagur 5. apríl:
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhan R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Svøvnlag, Jógvan Róin
Mikudagur 6. apríl:
kl. 10-16 Binding við perlum (á stokkum nr. 2), Katrin Samuelsen. Tilm. 316491
kl. 15 Túrur niðan undir Svartafoss

BRÚDLEYP

Leygarmorgunin 9. apríl kl. 8.00 giftast í Kollafjarðar kirkju Oddny H. Hansen úr Kollafirði og Petur (Piddi) Olsen úr Runavík. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Kollafirði frá kl. 9.30.

Leygardagin 16. apríl giftast í Vesturkirkjuni kl. 17.00 Sanna Poulsen og Jóan Pauli Joensen, Tórshavn. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 322669, 223769 ella 223027, áðrenn 6. apríl.

Fríggjadagin 6. mai giftast Olga Kristina Eysturstein og Sigmund Petur Skorastein, Leirvík. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 443110, 443046 ella 229145 í seinasta lagi 27. apríl.

GULLBRÚDLEYP

9. apríl hava Jastrud og Sámal Clementsen, Havn, gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

DIAMANTBRÚDLEYP

Hósdagin 7. apríl hava Anna og Dánjal P. Nielsen, Klaksvík, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin hjá Jonu og Karl, Undir Fossum 44, kl. 15.00-20.00.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

»Tí at annan grundvøll kann eingin leggja enn tann, sum lagdur er, og hann er Jesus Kristus.«
(1. Kor. 3,11)

Við Jesu deyða og uppreisn er ein grundvøllur lagdur. Við Jesu deyða og uppreisn hevur Gud sigrað á tí ónda. Sigurin er vunnin. Og grundvøllurin er lagdur, fundamentið er lagt undir okkara lívi og tilveru. Hesin sigur gjørdist okkara í okkara heilagu dópsstund og hvørja ferð vit í trúgv siga ja til at byggja á henda sigur.

Tað er hetta gleðiboðskapurin boðar okkum. Grundvøllurin er lagdur. Og vit eiga hvønn dag at lata okkum sannføra til trúgv, kærleika og vón av orðinum, sum boðað verður. Vit eiga hvønn dag at byggja á grundvøllin, Kristus. Og tá vit hoyra hin glaða boðskapin boðaðan, fáa vit megi og kraft og inspiratión til at liva kærleikans lív í heiminum. Trúgv okkara er føst og óvikandi, tí hon er bygd á Kristus og tað vil siga á kærleikan. Hesin kærleiki var krossfestur langafríggjadag, men reis upp aftur páskamorgun. Gud sigrar altíð á tí ónda. Hann er sterkur, tá hann er veikur, hann opinberar seg undir sínum mótsetningi. Og tað merkir, at tá alt tykist vónleyst og alt tykist at vera tapt, tá sigrar Gud.

Tað var hetta, sum hendi á krossinum. vit eru sum kristin sett at bera Kristi sigur víðari til onnur, tí vit eru Guds armar í heiminum. Gud nýtir okkum til at bera tað góða til onnur. Sigurin er vunnin og grundvøllurin er lagdur. Og vit hava dópin og trúnna, vit hava andan og orðið og sakramentini. Og vit hava kærleikan og vónina.

Okkara uppgáva er at bera hetta til onnur. Soleiðis bera vit ein neista av Guds góðsku, kærleika og vón til onnur. Og tað er okkara uppgáva at gera tað!

David Johannesen